# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Frits Johannesen, 60 ár:

## Heiðurskonsert fyri Frits Johannesen í Fuglafirði



Rættur hátíðardámur var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði fríggjakvøldið 21. mai, tá Frits Johannesen bleiv heiðraður í samband við 60 ára føðingardagin

*Mynd: Theodor Erling Johannesen*

**Fríggjadagin 21. mai var skipað fyri heiðurskonsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði í sambandi við at Frits Johannesen, lærari, kórleiðari og listamaður, fylti 60 ár**

Rættur hátíðardámur var yvir Fuglafirði fríggjakvøldið. Mentanarhúsið var karmur um eina heiðurskonsert fyri Frits Johannesen, lærara, kórleiðara og listamanni, sum fylti 60 ár dagin eftir.

Skráin var fjølbroytt við t.d. Havnarkórinum undir leiðslu av Ólavi Hátún, Kór Glyvra Kirkju undir leiðslu av Meinhardi Bjartalíð, Siloakórinum undir leiðslu av Eyðun á Lakjuni, barnakór undir leiðslu av Marthu av Lakjuni, Fuglafjarðar Hornorkestri, Fuglafjarðar Sangkóri undir leiðslu av føðingardagsbarninum Frits Johannesen, og Fuglafjarðar Gentukóri undir leiðslu av Eyðuni av Lakjuni, eisini sungu og spældu Kim Hansen og Stanley Samuelsen.

Fleiri røður vóru hildnar av t.d., Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra, Sigurd Simonsen, borgarstjóra í Fuglafirði, Jógvan Finn Poulsen, vegna Fuglafjarðar Hornorkestur, og Dávur Winther, samskipara av tiltakinum.

Ein myndaframsýning av gomlum myndum hjá Frits var í Riberhúsi í vikuskiftinum.



*Frits og konan, Alexandra*

*Mynd: Theodor Erling Johannesen*



*Barnakór úr skúlanum í Fuglafirði sang undir leiðslu av Marthu á Lakjuni*
*Mynd: Theodor Erling Johannesen*

## Finngerð Hansen 50 ár



Hósdagin 27. mai fyllir Finngerð Hansen 50 ár. Finngerð er ættað úr Hvalba, dóttir Jacobinu og D. J. Sørensen.

Finngerð er gift við Jóannes Hansen, ættaður úr Hornabø, og eiga tey børnini Jan, Høgna og Anniku.

Finngerð er arbeiðssom, blíð og fyrikomandi, og mangar stuttligar løtur hava vit havt í hugnaliga heimi teirra í Tórugøtu.

Føðingardagin verður hon stødd hjá soninum Høgna, ið er giftur við Maju, og búgva tey á Amager.

Vit í bindiklubbanum ynskja Finngerð hjartaliga tillukku við føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini.

### Starvsdagur

15. mai 2004 hevði Anita Góðadal 25 ára starvsdag hjá Statens Luftfartsvæsen. Almenn móttøka verður á Vága Floghavn fríggjadagin 28. mai kl. 14.00–16.00.

### Dagurin

**27. mai. Lucianus,** deyður umleið ár 200. Saman við fleiri øðrum tikin av døgum um Svartahavsleiðina.
*Kristian Osvald Viderø varð føddur hendan dagin í 1906.*






NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Statens Luftfartsvæsen, Vága Floghavn:

## Anita Góðadal 25 ára starvsdag



Leygardagin 15. mai hevði Anita Góðadal 25 ára starvsdag á Vága Floghavn.

Anita Góðadal er ættað og búsitandi í Sørvági. Hon er dóttir Andreu og Hentza Johansen, og er gift við Bjarna Góðadal, og eiga tey tvey børn, Gunna og Hentza.

Tá ið Anita byrjaði á flogvøllinum við at gera reint, var ikki tann nógva flogferðslan, sum vit kenna hana í dag, og var ongin flogferðsla sunnudagar og týsdagar og ikki sum nú, har umleið 85 flogfør koma og fara um vikuna í summarhálvuni.

Tilskilast kann eisini at í 1979, tá ið Anita byrjaði her á vøllinum, vóru 50.000 ferðandi um flogvøllin og umleið 22 starvsfólk á øllum flogvøllinum. Í 2003 var talið ikki minni enn 163.000 ferðandi og umleið 160 starvsfólk á flogvøllinum. Sostatt hevur hon tikið lut í tí menning, sum hevur verið innan flogferðsluni.

Arbeiðsgongdin er nógv broytt hesi árini frá einans at gera reint og so til dagin í dag, har ein stórur partur av degnum gongur við at hava trygdareftirlit av ferðafólki og ferðagóðsi, og mugu nógv fólk kennast við Anitu, tá ið tey síggja hana aftur, og sær tað út til, at hendan uppgávan bara verður størri og størri. Fleiri og fleiri krøv koma uttanífrá í samband við trygdareftirlit o.a.

Dagurin verður hildin fríggjadagin 28. mai við almennari móttøku í terminalinum á flogvøllinum ímillum klokkan 14 og 16.

Minningarorð um

## Gudmund Gudmundsson Isfeldt



7. januar 2004 var ein ólukkudagur, ein dagur sum eg vil minnast aftur á við virðing og sakni. Tað var dagurin har ein av okkara frægastu monnum, og besti vinur mín varð tikin heim. Hesin dagur vil altíð standa fram sum ein dagur, har havið og náttúrukrefturnar fingu fríar teymar til at niðurbróta lívið, ein dagur har meiningin við lívinum ikki gav nakra meining longur. Eftir sita vit, sum kendu hendan mannin, við stórum sakni, hann fylti so nógv í okkara gerandisdegi. Gudmundur fylti so nógv hvar enn hann var.

Tá ið eg siti og hugsi aftur á hendan mannin, hetta monumentið í mínum gerandisdegi, so eru tað tvey ting sum koma fram fyri meg. Láturin, hesin sermerkti klingrandi látur sum kom frá hjartanum, og kundi fylla eitt heilt rúm við gleði og smíli. Altíð í góðum lag, altíð fyrikomandi var Gudmundur. Hitt sum eg komi at hugsa um er erligheitin, Gudmundur legði ongantíð fingrarnar ímillum, ballaði einki inn, tá ið hann segði sína meining, um samfelagið og kanska serliga um dagsins politik. Hann kundi vera so bersøgin og beinrakin við sínum meiningum, at tað rann mær kalt eftir rygginum.

Men tann klingrandi láturin er fyri altíð tagnaður, og tær ósensureraðu meiningarnar eru sokknar í tað kolasvarta og kalda havið.

Eg fari ikki her at lýsa Gudmund meira, hvør hann var, hvussu hann var, hansara lívsverk o.s.fr. Tí tað vita øll sum kendu hann og vóru honum nær. Míni orð og mín pennur røkkur ei heldur eina slíka lýsing, tí hon er so umfatandi. Har var so nógv gott og so lítið ringt í honum.

Góða Solveig, børn og abbabørn. Eg veit, at tað í eini so svárari tíð má vera ringt at seta álitið á Harran, men vit mugu ugga okkum við, at tað hóast alt mátti vera ein meining við, at Hann tók Gudmund heim so tíðliga, og at Harrin hóast alt gav okkum likamið av Gudmundi aftur, so tað kundi fáast í kristna jørð.

Við hesum fáu og fátæku orðum vil eg lýsa frið yvir minnini um Gudmund Gudmundsson Isfeldt.

**Hergeir**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri maður, pápi, verpápi, abbi
og langabbi okkara

**Jaspur við Garð**
Kollafjørður

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 24 mai,
65 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Zion hósdagin 27. mai kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Kitty, Hervør, Joan og Evald**

Tey, ið vilja minnast Jaspur, kunnu lata eina peningagávu til
Føroya felag móti krabbameini, konto í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sera stóra hjálp
og sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir
og abbi okkara

**Páll Sverri Patursson**
bóndi í Kirkjubø

var sjúkur, andaðist og varð jarðaður.

Somuleiðis takka vit tykkum sum heiðraðu hann
á 60 ára degnum 1. mars.
Hjartans tøkk øll somul.

**Sølvá**

**Jóannes,Guðrið, Ólavur, Páll og Terji**

**Pól, Guðrið og Sølvá**

**Sigert og Sølvi**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri
maður, pápi og abbi okkara

**Jónathan Andreasen**
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á deild M á Klaksvíkar Sjúkrahúsi
og til tykkum á B8 og B6.
Tøkk til prest og kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk til tykkum sum vitjaðu inn á gólvið
og til tykkum, sum ringdu til okkum.
Takk fyri blómur og kransar og tykkum, sum sendu
gávur til Føroya Felag ímóti Krabbameini.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini
og ervinum.
Og til tykkum øll, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*

**Jóhanna, Oda, Jastrid, Eydna og Karin**